# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BOOMERANGUR HJÁ FAKFELØGUM

Vit plaga at siga, at vit skulu læra av søguni, læra av gjørdum gerðum - og mistøkum. Men tað tykjast fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum ikki at halda. Í gjár sendu tey út tíðindaskriv við boðskapinum um, at tey ætla at stovna ein nýggjan flokk, sum helst skal eita »Samstarv«.

Fakfeløgini aftan fyri ætlanina eru Føroya Pedagogfelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Starvsmannafelagið og Føroya Lærarafelag. Og tey skjóta bæði eftir samgongu og andstøðu – Javnaðarflokki og Tjóðveldi:

»Andstøðan situr tigandi og góðtekur, at lønarspurningurin millum fakfeløgini og myndugleikarnar er blivin eitt ræðandi politiskt amboð fyri at halda vinglandi samgonguni gangandi. Samgonguflokkarnir hava beinleiðis gjørt seg inn á fakfelagsrættin, tá ið teir gera semjur um lønarspurningin uttan at samráðast við fakfeløgini fyrst. Almennu fakfeløgini meta ikki, at hetta eigur at verða góðtikið. Endamálið við at stovna nýggjan flokk er at tryggja og styrkja vunnin fakfelagsrættindi Føroya fólki at frama.«

Tað eru ikki meira enn sekstan ár síðani, at fakfeløgini seinast stovnaðu ein politiskan flokk. Hetta var eisini ein protestflokkur - sum vann sær trý fólk á ting, Kristian Magnussen, Óla Jacobsen og Ingeborg Vinther. Men skjótt hoknaðu tey, og klandur og stríð eyðkendi arbeiðslagið, og endin varð, at Kristian og Karl Robert Johansen, sum var tingmaður meðan Óli Jaocbsen var landsstýrismaður, vórðu tveittir úr flokkinum, Ingeborg Vinther hættaði sær ikki at stilla uppaftur, og veljararnir vrakaðu tað, ið eftir var av flokkinum.

Men tað er væl skiljandi, at fakfelagsrørslan troyttast av politikarum og teirra brotnu lyftum. Javnaðarflokkurin klárar ikki at liva upp til álitið at tryggja vælferðina - og tað skal ganga út yvir tey veikastu, tykist verða lagið. Tjóðveldi situr í andstøðu og finst at og tykist halda fast í eini miseydnaðari fullveldisætlan – sum flokkurin sjálvur so væl og virðiliga jarðaði med alla, tá tey søktu fullveldisskútuna.

Men at stovna nýggjan flokk á vinstraveinginum fer bara at nøra um sundurlyndið, sum longu hevur so góðan gróðrarbotn í hesum landinum. Heldur áttu hesi fólkini, sum standa fakfelagsrørsluni nær, at nýtt sína kreftir og sína ávirkan í ymsu flokkunum og fingið teir á kós aftur – tí allir flokkarar eiga veljarar millum fakfelagslimir.

Men tað kann bara vera ein ynskidreymur, at fakfeløg skulu stjórna landinum. Tað er ikki teirra uppgáva. Tað verður ein boomerangur, sum kemur verkafólkinum aftur um brekku.

**Fakfeløgini skulu halda seg til sítt egna virkisøki**

## Óheppin kúllur í útvarpinum



*Tað var Jóhann Mortensen sum skuldi spæla setikonuni á Sosialinum eitt puss...*

Útvarpið hevði í Góðan morgun Føroyar í gjár prát við Jóhann Mortensen, útvarpsmann, sum var so óheppin herfyri at skriva eitt skeivt andlát. Navnið á manninum, sum ringdi andlátið inn, varð lisið í staðin fyri navnið á tí deyða.

Hetta var sjálvandi óheppið. Men hetta fær okkum í Miðlahúsinum at hugsa um eina næstan 30 ára gamla søgu her úr húsinum við júst sama høvuðspersóni.

Tað var Ingálvur av Reyni, listamaður, sum hevði sent inn andlátslýsing í sambandi, at mamma hansara, var deyð.

Blaðmaðurin vildi spæla setikonuni á Sosialinum eitt puss og skoytti til stuttleika upp í endan á heilsanini, at »...fór heim til Harran - ***eftir Sanatoriivegnum...***«.

Hví eftir Sanatoriivegnum er framvegis, vita vit ikki, men hetta varð ikki uppdagað, fyrr enn blaðið varð prentað, og tá var ov seint. Boð vórðu send í eystur og vestur eftir fólki við týssj at strika yvir orðini »... eftir Sanatoriivegnum...« í hvørjum einasta blað - og óhepni skemtarin fekk uppgávuna at ringja til Ingálv av Reyni at biðja um umbering.

Sum tað edilga menniskja, sum Ingálvur var, so tók hann hetta við einum smíli – og í Miðlahúsinum smílast fólk enn eftir hesi søguni.


†
Tað kunngerst hervið, at kæra móðir okkara
Christina av Reyni
fór heim til Harran mánadagin 19.1
[redacted]
Ingolfur, Sigird og Jens Pauli

*...men hann slapp sjálvur at ringja til Ingálv av Reyni at biðja um umbering. Og boð vórðu send eftir fólki at koma á Sosialin at við týssj at strika yvir óhepnu orðini. Og at tað var effektiv striking prógvar blaðið, sum er í skjalagoymsluni á Sosialinum, tí har er eisini strikað útyvir Lýsingin stóð í Sosialinum 24. januar 1981*



**Gølur mugu fáa avleiðingar**

HØGNI HOYDAL OG KÁRI Á RÓGVI KJAK Á SÍÐU 40



**Framtøk á Tórsvølli**

JÓGVAN ARGE KJAK Á SÍÐU 39

## Jónleif kann eksluderast



Jónleif Johannesen, sum er talsmaður fyri almennu fakfeløgini, sum ætla at stovna ein nýggjan flokk, hevur frammanundan tikið seg av listanum hjá Javnaðarflokkinum í Norðoyggjum

Hann var valevni hjá Javnaðarflokkinum í Norðoyggjum við seinasta løgtingsval.

Herfyri boðaði hann Norðoya Javnaðarfelag frá, at hann ikki vil vera valevni floksins við komandi løgtingsval.

– Tað hevur einki við møguliga nýggjan flokkin at gera, sigur Jónleif Johannesen.

Hann valdi at fara av listanum í Norðoyggjum, tí seinast vóru tey fimm valevni í Norðoyggjum, og tað var ov nógv, sigur hann.

Jónleif Johannesen sigur, at hann ongar ætlanir hevur um at venda Javnaðarflokkinum bakið. Tvørurímóti fer hann at royna at ávirka flokkin, so hann aftur kemur á beint. Fyri tað um hann er talsmaður hjá almennu fakfeløgunum, merkir tað ikki, at hann møguliga verður valevni.

Her hugsar hann serliga um samráðingarrættin hjá fakfeløgunum.

- Fakfeløgini eru ikki bara ónøgd við Javnaðarflokkin, men líka so nógv við hinar flokkarnar, ið heldur ikki virða samráðingarrættin, sigur Jónleif Johannesen.

Í lógunum hjá Javnaðarflokkinum stendur annars, at floksleiðslan kann taka limaskapin frá limi,ið mótarbeiðir grundsjónarmiðum floksins ella ikki fylgir galdandi floks- ella felagslógum.

Seinast fakfeløg stovnaðu flokk, misti Javnaðarflokkurin helmingin av veljarunum – og hóat tað eru 16 ár síðani, so er flokurin ikki komin fyri seg aftur.

So tiltakið hjá Jónleifi Johannesen man valla fella í góða jørð í floksleiðsluni hjá Javnaðarflokkinum, sum sambært lógunum kann tveita hann úr flokkinum.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*